## Buffon í risahandli

Tosað verður nú um, at Manchester City er til reiðar at lata 800 milliónir krónur fyri at fáa italska málmannin Gianluigi Buffon til felagið. - Tá eg hoyri slík tíðindi um meg sjálvan, fær tað meg at smílast og verða stoltan. Men eg haldi bæði bein á jørðini, sigur Buffon við blaðið La Gazzetta dello Sport. 30 ára gamli Buffon er sáttmálabundin við Juventus.



## Brasil er bara til feriu

Venjarin hjá Inter, Jose Mourinho, heldur lítið um, at álopsspælarin Adriano verður settur í samband við brasilska felagið Flamengo. - Flamengo? Nei! Hvat í allar víðu verð skal hann gera. Brasil er gott til feriu, men ikki hjá Adriano at spæla fótbólt har, sigur ein avgjørdur Jose Mourinho, sum sjálvur helt jólaferiu í Rio De Janeiro.

## 2009 sum elituár

**Framúr úrslitini hjá nøkrum av einstaklingum okkara hava minkað um jantulógina og í størri mun legaliserað kjakinum um veruliga elitumenning í Føroyum**



ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lat tað verða sagt alt fyri eitt: Vit eru so langt, langt, langt ífrá komin á nakað, sum líkist málinum, um vit skulu tosa um veruliga elituítrótt í Føroyum.

Men 2008 hevur kortini í nógvar mátar verið árið, har fyrstu lítlu fetini eru tikin á leiðini.

Fyrst og fremst eru myndugleikar, sersambond og onnur, sum varða at ítróttinum, veruliga farin at tosa og kjakast um, hvat skal til, um vit skulu fáa gongd á nakra elitumenning í Føroyum. Og hóast tær 600.000 krónurnar, sum eru settar á fíggjarlógina, av mongum munnu síggjast sum ein viðfáningur, so er hetta tó ein byrjan, sum í øllum førum er betri enn nullið, sum annars hevur veri á fíggjarlógini.

Fyrst og fremst er at frøast um, at kjakið nú fer fram meira opið, enn tað nakran tíð áður hevur gjørt. Tilvitskan um týdningin av teimum avrikum, sum fremstu ítróttarfólk fremja, er vaksin, so hvørt sum kjakið um tjóðarbygging, branding og kanska eisini innovatión hevur tikið seg upp.

Og samstundis hava okkara bestu leverað vøruna. Ikki endiliga tí at tey hava verið stuðlað so nógv av føroyskum myndugleikunum. Men Pál Joensen valdi at taka eitt ár burtur úr álmanakkanum av sínum eintingum, meðan Katrin Olsen hevur sýnt somikið góð avrik, at hon gjørdist partur av Team Danmark skipanina. Og saman við vinnuligum stuðlum hevur hetta skapt neyðugu karmarnar hjá teimum at mennast.

Uttan at forsmáa onnur, so hava tey bæði prógvað, hvussu langt kann røkkast, um viljin og evnini eru til tað. Og saman við nýkomna kjakinum, sum nú hevur avloyst jantulógina, hevur hetta eisini birt eina vón um, at okkara allar bestu í framtíðini kunnu fáa neyðugu karmarnar.

Sjálvandi skal fótarbeiðið fyrst og fremst gerast innan ÍSF og sersambondini. Men eitt nú innan svimjing, flogbólt og talv er hetta arbeiðið ígongd við fullari ferð. Hetta eru samstundis ítróttir, har sponsorinntøkur ikki eru so sjálvsagdar – og slettis ikki í hesum døgum – og tí er altavgerandi, at politiski myndugleikin spælir við. Hví ikki við at gera 2009 til elituár.

Gott nýggjár.

# Dido landsliðsvenjari í Bangladesh



*Brasilski Dido, sum ikki gjørdist Víkingur, tá trupulleikar vóru við venjarapappírinum, skal nú royna seg sum landsliðsvenjari hjá Bangladesh*

**Dido, sum mátti gevast sum venjari hjá Víkingi í fjør, er nú blivin landsliðsvenjari í Bangladesh**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Dido kom til Føroya tíðliga í fjør at venja Víking. Men hann fekk ikki venjarapappírini hjá sær góðkend og noyddist at gevast aftur.

Nú hevur Dido fingið nýtt starv. Heimasíðan hjá FIFA skrivar, at Dido skal venja landsliðið hjá Bangladesh. Dido tekur við starvinum í Bangladesh 1. februar, og sáttmálin millum partarnar varðar í 1 ár fyribils.

Dido er niðurlendskur ríkisborgari, og sum spælari royndi hann seg í brasilsku stórfeløgunum Flamengo og Santos í áttatiárunum. Hann hevur drúgvar royndir sum venjari. Hann hevur vant feløg í 1. deild í Ísrael og Malta, og hann hevur eisini áður verið landsliðsvenjari fyri Vietnam og Taiwan.

Bangladesh er styrkistmett sum nummar 174 á listanum hjá FIFA, og tað er 10 pláss frammanfyri føroyska landsliðið.

# Fleyr og SÍ í finaluni

**Um vikuskiftið eydnaðist kvinnunum hjá Fleyr og monnunum hjá SÍ at spæla seg í steypafinaluna í flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta gjørdu tey, tá stóra Mjølnir-kappingin var á flogbóltsskránni um vikuskiftið.

Hjá kvinnunum var longu greitt, at SÍ var annað liðið í steypafinaluni, og tá Fleyr og Dráttur so komu í finaluna í Klaksvík, stóð greitt, at vinnarin her samstundis vann sær hitt finaluplássið.

Roknast kundi við einum spennandi dysti, og tað gjørdist tað so sanniliga eisini. Fleyr vann tey bæði fyrstu tøttu settini, men Dráttur knekkaði als ikki av hesum, og eins tætt vunnu tær tey bæði næstu settini.

Neyðugt varð tí við javnbrótara, og her hevði Fleyr flestu kreftirnar eftir. Og havnarkvinnurnar kunnu nú gera seg til reiðar at spæla sína fyrstu steypafinalu, síðani kappingin varð umskipað fyri átta árum síðani.

Hjá monnum stóð finalan millum SÍ og Fleyr. SÍ hevði longu vunnið Fleyrkappingina í heyst, og tá ÍF umvegis landskappingina hevði bílagt sær fyrsta finaluplássið, kundi ein sigur til Fleyr gera tað neyðugt við enn einum dysti, har steypafinalusturin skuldi finnast.

Men hetta læt SÍ tó ongan iva vera um. Sørvingar vunnu nevnliga trygt 3-0, og soleiðis verða tað teir, sum um góðan mánað skulu spæla steypafinalu móti fuglfirðingum.

| | | |
|---|---|---|
| **Kvinnur:** | Fleyr-Dráttur | 3-2 (25-22, 25-23, 25,-27, 23-25, 15-8) |
| **Menn:** | SÍ-Fleyr | 3-0 (25-20, 25 – 22, 25 – 19) |